

Skrappe krav

Det danske lån til Færøerne

DET ER skrappe betingelser, den danske regering har stillet for at give Færøerne et lån på 350 millioner kroner, som skal forhindre, at den største bank, Sjøvinnubanken, krakker. Skrappe, ikke mindst på baggrund af situationens alvor. Den færøske delegation, som er kommet til København med tiggerstaven, mere end antydede, at Færøerne trues af bankerot, hvis den danske regering ikke rykker ud med penge. Spørgsmålet er, om de danske betingelser er for hårde, je ligefrem udtrykker en formynderisk holdning over for den tidligere kolonI. Den Internationale Valutafond (IMF) er blevet bedt om at vurdere den færøske situation. Man kan roligt gå ud fra, at IMF vil foreslå forholdsregler, som er mindst lige så vidtgående som de danske krav. Men kunne færingerne ikke forvente større forståelse og mildhed hos danskerne? De to folk lever dog i et rigsfællesskab.

SÅ MEGET er sikkert. De danske betingelser griber betænkeligt dybt ind i det hævdvundne mønster for det færøsk-danske samarbejde. På Færøerne (og i Grønland) har Hjemmestyret udskrevet skat i henhold til egen lovgivning. Arbejdsmarkedet er som, sagsområde også overgået til det færøske Hjemmestyre.

Når den danske regering kræver de færøske skatter og arbejdsløshedsbidrag sat i vejret som betingelse for lånet, er der i realiteten tale om et forsøg på at begrænse Hjemmestyrets magt. Det samme kan siges om den danske regerings krav om et stop for anlægsarbejder og en begrænsning af fiskerikapaciteten.

MEN AT blive sat mere eller mindre under administration er nu engang risikoen, når enkeltindivider eller folk søger lån. For få måneder siden ydede Danmark et lån på 500 millioner kroner til Færøerne for at redde Sjøvinnubanken, og allerede dengang talte Hjemmestyret om at føre en tunnel igennem fjeldet til 18 indbyggere. Danmark har altså vist den gode vilje, man kan forvente mellem folk, der står hinanden så nær. Færingerne viste til gengæld, at de ikke helt havde fattet situationens alvor.

Men dermed er ikke sagt, at Danmark ikke kan yde penge. Det bør være en selvfølge, at Danmark bistår med støtte til de strukturændringer, som Færøerne har så hårdt brug for. Problemet er blot, at Danmark selv har så svært ved at omstrukturere sig. Vi herhede i den sydlige del af riget har intet at bryste os over. Alt for længe troede også vi, at det gik ufatteligt godt. Nu er det færingernes tur til at blive klogere.

– POLITIKEN

Et stolt folkefærd har fået et knæk

Den danske regering vil dog ikke 'diktere' færøsk politik

Færinger skal bruge fem mia.

Donsku bløðini gjørdu nógv burturúr týsdagin og fleiri donsk tíðindafólk er í Føroyum í løtuni, so vit koma at hoyra um Føroyar í donskum fjølmiðlum næstu dagarnar

Berlingarin:

Føroyingar hava tørv fyri fimm milliardum

–Okkum tørvar fimm milliardir, skal búskapurin koma aftur á rætt kjøl, sigur Helgi Fossadal, bankastjóri við Berlingaran í stórari grein á forsíðuni

Donsku bløðini eru spekkað við tilfari um "elendigheitina" í Føroyum. Kenda og vælvirkt blaðið Berlingske Tidende ofrar høvuðssøguna á forsíðuna uppá Føroyar.

Journalisturin John Jakobsen, sum kom til Føroya í gjár, hevur eina samrøðu við Helga Fossádal, stjóra í Fossbankanum:

–Okkum tørvar fimm milliardir krónum, skal føroyski búskapurin koma aftur á rættkjøl. Og tær fyrstu tvær hava skund. Í løtuni gjalda vit 100 milliónir krónum um mánaðin í rentu av okkara lánum uttanlanda og tað klárar eitt land sum Føroyar als ikki, sigur hann

Helgi Fossádal sigur, at treytirnar, sum danska stjórnin hevur sett føroyingum sum treyt fyri, at teir vilja lána okkum 350 milliónir fyri at bjarga Sjóvinnubankanum, eru sera torførar at halda.

–Hetta er órealistiskt. Vit klára ikki eftir fáum mánaðum at siga hvørji skip skulu leggjast og hvørji virkir, sum ikki kunnu bera seg.

Helgi Fossádal sigur at vit eru enn ikki komin á botn: "Fáa vit ikki pening nú, so mugu vit sanera við at lata skip og virkir fara á húsagang og so byrja av nýggjum", sigur hann.

Politiken ger nógv burturúr

Í Politiken týsdagin eru ikki færri enn tíggju greinar um Føroyar og harav eisini innanlandis oddagreinin.

"Et stolt folkefærd har fået et knæk" eitur tann eina yvirskriftin, har Óli Breckmann sigur við blaðið, at aftaná treytirnar, sum danska stjórnin hevur sett, kann føroyski avgerðarrætturin innan heimastýrislógina liggja á einum ógvuliga lítlum øki.

–Hetta er ein eyðmýkjandi avtala føroyingar hava gjørt. Vit føroyingar eru eitt erri fólk, sum eru vanir at svara hvørjum sítt. Nú mugu vit ferð aftan á ferð taka biddarastavin í hond. Tá okkara rættur at reka okkara egna búskaparpolitikk, tá er ongin meining í at eiga sjálvstýri, sigur Óli Breckmann.

Missa sjálvstýrið

Oddagreinin í Politiken hevur greiðan boðskap. Danir royna at skerja føroyska sjálvstýri. Har stendur, at tá danir krevja at føroysku skattirnir hækka og at hvør einstakur skal gjalda meir til arbeiðsloysisstuðulsskipanina, so er í veruleikanum talan um, at danir royna at avmarkað føroyska sjálvsavgerðarrættin.. Tað sama kann sigast, tá danir siga, at allar íløgur í almennum arbeiði skal steðgast og at fiskiflotin skal minkast.

Men oddagreinin vísir eisini á, at føroysku politikkararnir hava ikki sýnt ábyrgd, heldur ikki seinastu fýra mánaðarnar, síðan vit tóku fingu eitt lán uppá 500 miliónir fyri at bjarga Sjóvinnubankanum.

Hóast hetta lán varð givið so tosaðu føroyiskir politikkarar framvegis um at játa pening til ein tunnil, (Gásadalstunnilin), blaðmaður. til 18 fólk.

"Danmark har alsá vist den gode vilje, man kan forvente mellem folk, der står hinanden så nær. Færingerne viste til gengæld, at de ikke helt havde fattet situationens alvor".

jústinus

Føroyar undir luppin

Danskir journalistar til Føroya

Tríggir journalistar og tvey myndafólk við danska flogfarinum í gjár

Donsku fjølmiðlarnir sýna búskaparkreppuni í Føroyum stóran áhuga. Týsdagin vóru greinar um Føroyar á forsíðuni á hvørjum einasta stóra blaði í Danmark. Bæði TV2, Danmark Radio og danska sjónvarpið gjørdu nógv burturúr. Føroyar vórðu nevndar í tímatíðindunum í danska útvarpinum, allan sunnudagin, mánadagin og týsmorgunin og tað er sjáldsamt.

Mikudagin var ein fittur partur av teimum 18 ferðafólkunum á Maersk Air flogfarinum fólk sum starvast innan fjølmiðlarnar. Umframt undirritaða vóru fimm fólk frá donsku pressuni.

TV 2 hevði sent Martin Uhlenfeldt, sum er serfrøðingur í fíggjarjournalistikki. Hann er kendur fyri at vera ein rættuliga nærlægdur tíðindamaður og er kendur fyri at fara niður á botn í einum máli.

Við í flogfarinum var eisini John Jakobsen, sum tekur sær av at skriva um búskap í Berlingaranum. Hann hevur fyrr starvast á Information. Við honum var ein myndakvinna.

Ekstrablaðið var eisini umboðað í flogfarinum. Carl Johan Albrectsen, sum fleiri ferðir hevur vitjað Føroyar og millum annað gjørdi navnframa viðtali Ólavur Nolsøe, skipara úr Dali og skrivaði um Heygadrang, var eisini við.

Donsku tíðindamennirnir ætla í fyrsta umfari at vera í Føroyum til fríggjadagin, lítil ivi er um, at føroyingar vera í fokus komandi dagarnar í donsku fjølmiðlunum.

jústinus

Ov ungur at koyra

Um hálvgum eitt tíðina týsnáttina ringdi ein drongur av Meginskúlanum á Sandi eftir hjálp.

Drongurin, sum bara var 17 ára gamal, var farin við bili einsmallur, og millum Krókafoss og Meginskúlan var hann farin einar hundrað metrar oman av vegnum.

Hann gekk sjálvur teir 1200 metrarnar til skúlan, har hann breyt seg inn fyri at koma til telefon og biðja um hjálp.

Bilurin var ikki farin runt, men drongurin hevði sligið høvdið í.

Læknin kom, og hann dugdi ikki at meta, um drongurin hevði fingið skaða í høvdið. Læknin avgjørdi tí at senda drongin beinanvegin við Tróndi til Havnar, so hann kundi verða kannaður á Landssjúkrahúsinum.

randi